# Gevaralondini svíkja tey afghansku børnini

Alt fleiri børn í Afghanistan líða av, at tey hava ov lítið til matna. Felagsskapurin Læknar uttan landamark sigur, at í dag doyggja tvær ferðir so nógv afghansk børn sum fyri einum hálvum ári síðani

**BAKGRUND**
*Árni Joensen*

Felagsskapurin Læknar uttan landamark, sum hevur vunnið viðurkenning víða um heimin fyri arbeiði sítt við neyðstøddum, rópar nú varskó um viðurskiftini hjá børnunum í Afghanistan. Felagsskapurin sigur, at tey, sum búgva har norðuri í landinum, fáa ikki ta matvøruhjálp, sum teimum er lovað.

- Tað er onkur, sum svíkir, stendur í einari nýggjari frágreiðing hjá felagsskapinum, har viðurskiftini hjá teimum mongu neyðstøddu verða lýst sum sera álvarssom.

Í frágreiðingini stendur, at felagsskapurin ferð eftir ferð hevur kunnað tey sonevndu gevaralondini og altjóða hjálparfelagsskapir um, at flutningurin av matvørunum í Afghanistan virkar ikki eftir ætlan.

- Vit hava ferð eftir ferð staðfest, at nógv børn hava alt ov lítið til matna, og vit hava tí biðið londini og felagsskapirnar útvega okkum mat, so vit sjálvir kunnu hjálpa teimum neyðstøddu. Men enn hava vit bara fingið ella rættari sagt fingið lyfti um hjálp, men als ikki tað, sum vit hava biðið um, og sum er neyðugt, sigur MSF í frágreiðingini.


*Afghansk børn*
*Mynd: Reuters*

## Selja alt fyri mat

Næstformaðurin í norsku deildini hjá MSF, Atle Frettheim, segði í síðstu viku, at felagsskapurin leggur ikki nakað einstakt land ella nakran einstakan felagsskap undir at hava misrøkt sína uppgávu. Men hinvegin er tað greitt, at gevaralondini hava ikki givið Afghanistan ta hjálp, sum tey hava lovað, sigur hann.

Tað er Heimsins Matvøruætlan, sum hevur høvuðsábyrgdina av, at tær matvørurnar, sum koma til Afghanistan, verða fluttar hagar, sum tørvur er á teimum. Atle Frettheim sigur, at Læknar uttan landamark hava heitt á stovnin um at skipa arbeiðið betur.

Í sambandi við ta nýggju frágreiðingina hava umboð hjá MSF tosað við 1.290 húski í einari flóttafólkalegu í landspartinum Faryab, sum er har norðuri í Afghanistan tætt við markið til Turkmenistan. Tey flestu hava greitt læknunum frá, at tey eru í svárari neyð, og at tey hava selt alt, sum tey áttu, fyri at fáa pengar til mat. Tá læknarnir spurdu, hví tey vóru komin til flóttafólkaleguna, svaraðu fólk, at tey høvdu ikki annað í at velja, tí har tey búðu, var eingin matur at fáa.

Í frágreiðingini hjá Læknum uttan landamark stendur, at í dag eru fleiri børn í flóttafólkaleguni enn undan álopinum í USA tann 11. september í fjør. Í meðal koma umleið 30 børn afturat til flóttafólkaleguna um dagin, og sætta hvørt barn hevur týðiliga fingið ov lítið til matna.

- Hvønn dag rýma fólk frá húsi og heimi at leita sær eftir onkrum at eta. Síðst í november vóru umleið 15.000 fólk í flóttafólkaleguni við turkmeniska markið. Í dag eru tey 23.000, stendur í frágreiðingini hjá Læknum uttan landamark.

## Nógvir trupulleikar

Noreg hevur ein leiðandi lut í hjálpararbeiðinum í Afghanistan, og talsmaðurin hjá norska uttanríkisráðnum, Karsten Kleppsvik, ásannar, at alt hevur ikki gingið eftir ætlan.

- Í veruleikanum kemur nóg mikið av mati til Afghanistan, men trupulleikin er at fáa matin til teirra, sum skulu hava hann, sigur Karsten Kleppsvik. Hann sigur, at Noreg og hini gevaralondini eru greið yvir, at stórt trot er á matvørum nógvastaðni í Afghanistan, men hjálparliðini hava tann trupulleika, at ferðasambandið er nógv darvað av vetrinum, og harafturat er tað minni enn so líka trygt at ferðast allastaðni í landinum.

Seinastu tíðina hava tey, sum skipa fyri matvøruflutninginum, tosað um at nýta aðrar flutningshættir enn teir vanligu og at fáa teir afghansku myndugleikarnar at veita sær hjálp. Men her er tað eisini ein trupulleiki, at myndugleikarnir í Kabul hava ikki nóg gott eftirlit við øllum landinum, og at tað nógvastaðni eu teir sonevndu krígsharrarnir, sum hava tað veruliga valdið.

Og tað eru minni enn so allir teirra, sum hava líka stóran áhuga í, hvussu tað vanliga fólkið og allarminst børnini hava tað.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Signar í Homrum, Svøríki, sihep@algonet.se
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Eftirløn valdast

Vit menniskju eru nú einaferð rættiliga løgin. Tá alt gongur væl, eru tað vit, men tá tað so gongur illa, eru tað hini.

Her í Svøríki hevur man í seinastuni hugt sera nógv eftir, hvat stjórar og onnur sum sita høgt uppi í samfelagnum, hava í løn. Tað er nú ikki so undarligt, tí tá fyritøkur siga hundrað- og túsundtals fólki upp, og flyta fyritøkur uttanlands, so vil man nokk vita, hvat hesi fólk fáa í løn fyri tað tey gera. Eitt navn fram um øll onnur hevur verið frammi, og tað er fyrrverandi nevndarformaðurin í ABB, Percy Barnevik. Barnevik er eitt hugtak innan svenskt vinnulív, eyðkendur sum ein sera dugnaligur leiðari, sum fekk alt hann var við í, at ganga væl. Men so brast bumban... Aftaná Barnevik var farin frá sum nevndarformaður, skuldi hann sjálvandi hava eftirløn, onki ringt um tað. Men tað sum fekk øði í fólk, var, at eftirlønin var umleið 950 milliónir. Og fyrrverandi stjórin í ABB hevði eisini eina rímiliga góða avtalu, sjálvt um hann "einans" fær 450 milliónir. Og hetta samstundis sum ABB sigur fólki upp í hópatali, fyri at standa ímóti minkandi sølu og einum risaundirskoti.

Áðrenn alt hetta kom fram, vóru tað nógv sum vildu hava Barnevik heiðraðan av kongi, fyri sítt vinnulívsavrik. Sjálvandi gekk fyritøkan ikki so væl nú, men tað var jú aftaná, at Barnevik hevði lagt frá sær, at tað byrjaði at ganga illa. Men alt tos um kongaligan heiður, forsvann sum døgg fyri sól, tá eftirlønaravtalan kom fram fyri almenningin. Barnevik sjálvur var í London tá alt rokið tók seg upp, og hann varð spurdur í tíðindasendingini hetta kvøldið, um hann veruliga helt, at hann var verdur hesar pengarnar? Tað svaraði hann ikki, men segði bert, at hann fekk tað, sum avtalan hjá honum segði. Og hendan avtalan var grundað á tað úrslit sum ABB hevur havt gjøgnum árini. Og fyri at skilja, hvussu tað hongur saman, so eru nøkur fakta um ABB, sum man má vita fyri at fáa roknistykkið at hanga saman:

Árini Barnevik var nevndarformaður, øktist umsetningurin 300 ferðir, vinningurin øktist 133 ferðir, og partabrævavirðið øktist 86 ferðir. So hevði hann eina góða avtalu frá byrjan, so er tað onki ímóti, hvat avtalan var verd, nú hann fór frá.

Men hóast 950 milliónir eru ófantaligir nógvir pengar, so havi eg tó ta áskoðan, at hevur man gjørt eina avtalu, so heldur man hana. Fyri at flyta tað yvir á føroysk viðurskifti, so kundi man hugsað sær ein trolara, har lønin er sett eftir, hvussu úrslitið verður. Og sigur man so, at báturin ger ein roktúr, at fiskað verður nógv betur enn væntað, fiskurin hevur nógv hægri góðsku enn væntað, og prísurin er fleiri ferðir betur enn væntað. Men manningin fær ikki ágóðan av hesum, tí "ongin kundi roknað við, at tað skuldi ganga so væl." Eg hugsi mær, at reiðarin í so fall sat eftir á onkrum ísflaka, um hann segði so.

Ná, men í hvussu er so fánaði stjørnan Barnevik burtur í onki. Øll tey sum fyrr høvdu róst honum, vendu honum nú bakið, og hildu við "hinum". Og tað er nokk sum man sigur, at tá eydnan vendir tær bakið, er hon ikki tann einasta.

Niðurstøðan av tí heila bleiv, at bæði Barnevik og fyrrverandi stjórin gingu við til at frásiga sær helvtina av eftirlønini, so at teir samanlagt "einans" fáa 700 milliónir, og eigarin av ABB í Sveits hevur sagt seg vera nøgdan við ta avtaluna. Tað sær betur út, nú teir siga so nógvum fólki upp.

Um tað er syrgiligt ella bara fullkomiliga láturligt, so endar hendan søgan við, at tær 700 milliónirnar, sum Barnevik og fyrrverandi stjórin frásiga sær, fara ikki til at skapa fleiri arbeiðspláss, ella fyri at bøta um rakstrarhallið. Tær fara í grunnin hjá ABB fyri stjóraeftirlønir. Teir mugu jú syrgja fyri, at fólk ikki líða neyð, tá tey einaferð fara frá. Og tað besta av tí heila:

Tað eru færri enn 100 fólk, sum fáa ágóðan av tí grunninum.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 29. mars til hósdagin 4. apríl

## Mr. Big – eitt portrett

*Hann dansar sum ein dreymur og hevur gjøgnum árini skrivað hundraðtals lesarabrøv. Maðurin, ið talan er um, er Hans Birgir Hansen úr Havn. Í sendingini fylgja vit Hans Birgir á ferð hansara í Havnar gøtum og í hansara dagligu gerðarmálum. Hans Birgir greiðir m.a. frá, hvussu hann var við til at byrja føroyska kvinnufótbóltin og um stóra plássið B36 eigur í hjarta hansara. Í sendingini greiðir Hans Birgir Hansen harumframt frá, hvussu hann ofta hevur kent seg órættvíst viðfarnan, ikki minst, tá hann hevur roynt at koma í samband við kvinnur.*




## Leygarkvøld í Lindini




## 32 mánaðir í Sacsenhausen




## Burturhugur




## Mr. Bean




## Nógvar nýggjar tónleikaupptøkur á páskaskránni hjá Útvarpinum

Sum vanligt hevur útvarpið nógvan tónleik á skránni páskadagarnar, og í ár verða fleiri nýggjar upptøkur at hoyra.

Langa fríggjadag verður onkur nýggj upptøka á skránni. Fuglafjarðar Sangkór hevði konsert í kirkjuni í Fuglafirði leygardagin 16. mars, og fríggjadagin kl. 16.45 fara vit at spæla burtur úr tí upptøkuni.

Páskadag fara vit millum annað at hoyra Ólav Jakobsen spæla klassiskan guitara. Hann helt konsert í Fuglafirði og í Havn í mars mánaða, og útvarpið festi konsertina í Norðurlandahúsinum tann 13. mars á band. Ólavur Jakobsen, sum er okkara fremsti klassiski guitarleikari, framførir bæði europeiskan og suðuramerikanskan guitar-tónleik.

2. páskadag fara vit at hoyra eitt sindur av nýskrivaðum jazzi. Norðurlendska trioin GRISFO er samansett av tónleikarum í Grønlandi, Íslandi og Føroyum – haðani navnið. Jim Milne úr Grønlandia klaver, Sigurður Flósason úr Íslandi á saxofon og Edvard Nyholm Debess úr Føroyum á bass fara at spæla eina skrá av sera væl-ljómandi jazz-tónleiki, sum útvarpið tók upp á konsert í Norðurlandahúsinum 3. mars.

Annars verður eisini nógvur annar tónleikur á skránni. Petur Birgir Petersen fer at hava eina sending um Matthæuspassiónina hjá J. S.Bach. Tann sendingin kemur páskadag kl. 15 og Kári Olsen fer at hava eina sending við oratoriinum hjá Ludwig van Beethoven – Kristus á Oljufjallinum. Tann sendingin er langa fríggjadag kl. 15.

hygg & hoyr

ynskir hyggjarum og hoyrarum einar gleðiligar páskir